# Petur(i) undir Snið til minnis

Kanska í so bráræsin, men tað var lyndiseyðkenni hansara – Peturi (Muller) undir Snið í Kvívík. Stórur og prúður, fagurt reyðhærdur, skarpleittur, ásýniligur og gløggur. Væl var hann mæltur, og gav hann ljóð frá sær, hoyrdist tað.



Persónleikin lýsti av andliti hansara. Hann kundi vera sera charmerandi.

Petur undir Snið var ein sermerktur persónur. Sera virkin og framfýsin og smæddist ikki fyri at seta nakað í gongd.

Har aðrir, heldur sinniligari enn Petur, vildu tátta í, tá teir hildu hann hava lyndi til at leypa framav, helt Petur fast við sítt. Hann var í mongum førum víðskygnari enn teir flestu. Tað gav at bíta, tá hann sum bygdarráðsformaður saman við øðrum fekk útint ta stóru verkætlan at fáa bátahylin víðkaðan - dokkina vit kallaðu - so útróðrarbátar nú kunnu liggja har so toluliga tryggir, hóast Kvívík er eitt ógvusligt brimpláss á útsynningi-suðri - umframt annað hann fekk í lag.

Hóast hann, sum mangur annar kundi snáva, so fótaði hann sær altíð aftur og gjørdi vart við seg. Hjá Peturi skuldi altíð okkurt gerast. Við hvørt kundi hann seta glísurnar á onkran, ið helt hann vera heldur framfýsnan. Tá kundi hann siga, at her sita vit ikki og kneppa hendur. Hann var vinsælur, men hevði sínar meiningar, sum hann ongantíð duldi fyri.

At koma niðan úr Urð - ella niðan av Fløtti - vóru Snið-húsini har. Tummas bróðir sáli og eg fingu mangan eitt vink um at støkka inn í kjallaran. Har var hugnaligt. Røkin sum hann var, vísti hann okkum millum annað korðuna hjá langabba sínum, »Gamla Müller« tey kallaðu - sum hevði verið í Slesvík-Hollstein krígnum í 1848/49 og annað, hann hevði savnað, vælt um og snøggað.

Nú hann, Petur undir Snið 81 ára gamal, varð borin út úr Kvívíkar kirkju herfyri, rann mær so nógv í huga. Eitt nú at minnast hann sum sjónleikara í teimum skemtiligu kommediunum (sponsku flugu o.ø.) Honum nýttist ikki at gera seg upp sum sjónleikara. Hatta er bara Petur, sum hann í veruleikanum var.

Sum starvsmaður á Telefonverki Føroya Løgtings, sum tað tá æt, kom hann víða um, serliga í Norðstreymoy og kom at kenna nógv fólk. Hann átti nógv vinfólk; tað sást, nú hann fór til gravar úr Kvívíkar kirkju. Sjáldan hevur so stórt fylgi fylgt einum kvívíkingi til gravar.

So leingi hann orkaði, var hann hvønn sunnu- og halgidag í kirkju. Hana var hann sera góður við; og at síggja hann í sínum stóli haldandi saman hendur, var ein fyrijáttan hjá honum um tað, ið koma skuldi.

Hjá øllum tykkara, Ebbu, Ansu, Helgu, Fríðu og »Lítla Peturi«, ið hann var so góður við, kenst nú ein tómi. Hann dregur upp í seg aftur sum frálíður.

Okkurt hevði tú sagt um hetta, ið tín góði vinmaður hevur fest á blað!

Hvíl í friði, góði Petur.

**Ívar**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jákup Petur Juul í Fuglafirði** fer av Landsjúkrahúsinum í dag kl. 17 í Fuglafjarða kirkju. Jarðaferðin verur leygardagin kl. 14. Tey, sum vilja minnast Jákup Petur, kunna lata eina gávu á konto hjá børnunum í Føroya Banka.

**Jana Niclassen**, ættað av **Velbastað**, búsitandi í **Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum 14. september, 84 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin kl. 16 í Kirkjubøar kirkju. Jarðaferðin verður úr Kirkjubøar kirkju mánadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Janu kunnu lata eina peningagávu til Parkinsonsfelagið. Konto í peningastovnunum.

**Kartin Reynheim**, Tórshavn, andaðist mikudagin 13. september, 56 ára gamal.

**Judith Henriksen úr Sandavági**, ættað úr Gomlustovu í Sumba, andaðist á Ellisheiminum í Vágum týsdagin 12. september, 87 ára gomul. Jarðaferðin verður av Ellisheiminum leygardagin kl. 13 í Sandavágs kirkjugarð.

---

†

Kunngjørt verður at kæri pápi, sonur, beiggi og svágur okkara

**Kartin Johan Reynheim**
Tórshavn

andaðist mikudagin 13. september, 56 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst í útvarpinum.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**

*Tey, ið ynskja at minnast Kartin, kunnu lata Frelsunarherinum í Havn eina peningagávu, kontu í peningastovnunum.*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at mín kæri drongur, pápi og okkara kæri sonur, beiggi og versonur

**Jákup Petur Juul**
Fuglafjørður

andaðist í Fuglafirði týsdagin 12. september, 26 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum á landssjúkrahúsinum í dag, fríggjadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju leygardagin 16. september kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Mary**
**Marna og Dávur**
**Elsa, Dávur, Bergar Borghild**
**Óluva og Jákup Marnar**

*Tey, ið vilja minnast Jákup Petur, kunnu lata eina peningagávu til børnini á konto í Føroya Banka.*

---

# Tøkk

Vit takka hjartaliga tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Lena Thomsen**
í Króki, Hvalba

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum vóru um hana, og tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur, kransar, gávur til Missiónshúsið og tøkk til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Petur, Poul, Hjartvard og Ebba**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Jana Niclassen**
ættað av Velbastað, búsitandi í Havn

andaðist 14. september, 84 ára gomul.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin kl. 16.00 í Kirkjubøar kirkju.
Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju mánadagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

*Tey, ið ynskja at minnast Janu, kunnu lata ein gávu til Parkinsonfelagið, konto í peningastovnunum.*

---

**Dagurin**

**16. september. Eufemia**, deyð umleið ár 300. Kvinnuligur píslluváttur, tikin av døgum undir Diocletianus keisara. Femja er konufólkanavn, sum hevur verið brúkt í Føroyum og eisini kemur fyri í nýggari tíð. Grikst navn sum merkir gott umdømi

**17. september. Lambertus**, deyður umleið ár 705. Biskupur í Maastricht í Hálandi. Hann varð dripin av aðalsmonnum, tí at hann setti at teimum fyri ólevnað.

**18. september. Titus**. Fleiri halgimenni eru við hesum navni, men her verður helst ikki, sum summir halda, sipað til tann Titus, sum Paulus skrivaði bræv til.

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, omma og langomma okkara

**Rachel H. Samuelsen**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til heimahjálpir, heimasjúkrasystrar og til starvsfólkini á Lágargarði, har hon búði seinastu tvey árini.
Tøkk til Sonju Klein, prest, fyri troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og gravara.
Tøkk fyri kransar, blómur og fyri gávur til Lágargarð og tøkk øll tit, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Lisbeth og Beate**